# Heiðraðir fyri trúgva tænastu

**Tveir skipafelagsmenn í Suðuroy vitstu av ongum, tá ið menn brádliga komu á dyr við blómum og gávum**

TRÚGV TÆNASTA
*Áki Bertholdsen*



*Tórheðin Jensen, høgrumegin, takkar Delmari Joensen, í miðjuni og Zacharias Bech fyri trúgva tænastu hjá skipafelagnum*

Tá ið Tórheðin Jensen á Skipafelangum í Havn, seinnapartin týsdagin kom fullfermdur inn á avgreiðsluna á Tvøroyri, var hann ikki ørindaleysur.

Ørindini vóru at hitta tveir av monnunum, sum arbeiða í avgreiðsluni á Tvøroyri.

Hann vildi takka teimum fyri trúgva tænastu hjá Skipafelagnum og við sær hevði hann blómur og gávur til hesar báðar menninar.

Teir báðir, Zacharias Bech og Delmar Joensen, vitstu av ongum og teir vórðu tiknir heilt á bóli, tá ið maðurin av høvuðsskrivstovuni rópti teir inn á skrivstovuna.

Í ár eru tað 30 ár síðani, at teir báðir komu í starv hjá Skipafelagnum. Síðani hava teir hingið í og tað vildi Skipafelagið geva teimum eina lítla viðurkenning fyri.

Tórheðin Jensen takkaði teimum fyri arbeiðið øll hesi árini og handaði teimum blómutyssi, hvør sína bók og okkurt gott at hugna sær á jólum við: Eina fløsku av reyðvíni og ein kekk uppá 5.000 krónur í part.

Jólaaftan eru 30 ár síðani avgreiðsluleiðarin hjá Skipafelagnum í Suðuroy, Zacharias Bech, kom í starv hjá Skipafelagnum.

– Tað eru nógv, sum hava undrast á, hvussu ein kann byrja eitt nýtt starv sjálva jólaaftan, men tað hevur sína søgu, greiðir Zacharias frá.

Á sinni var hann stýrimaður við Sofíu Lassen, sum var farmaskip úr Klaksvík, har hann eisini var skipari viðhvørt.

Men jólaaftan í 1972, yvirtók Skipafelagið bátin, tá vóru teir staddir í Imperia í Italia. Øll manningin fekk í boðið at fylgja við yvir á Skipafelagið og allir tóku av, minnist Zacharias Bech.

Skipafelagið man hava havt eitt serligt álit á honum, tí so hvørt, felagið fekk nýggj skip, varð Zacharias Bech biðin um at fara umborð á tey.

Sofía Lassen fekk navnið Svanur og honum var hann við, til Skipafelagið heitti á hann um at verða skipari á Ravni. Í 1978 stóð nýggi Lómur í gerð og har bleiv hann stýrimaður og onkuntíð eisini, skipari.

Og tá ið so Blikur varð bygdur í 1979, bleiv hann skipari har og tað starvið røkti hann til í 1987, tá ið hann fór í land og bleiv avgreiðsluleiðari hjá Skipafelagnum á Tvøroyri. Og har hevur hann verið síðani. Delmar Joensen hevur verið á goymsluni hjá Skipafelagnum í 30 ár og teir eru báðir rørandi samdir um, at hetta hevur verið eitt sera gott arbeiðspláss.

– Vit minnast ikki, at ein einasta mánaðarløn er komin ov seint, øll hesi 30 árini, siga teir báðir.

Í løtuni arbeiða eini 250 fólk í Skipafelagnum, tá ið deildir í Føroyum, Danmark og skipsmanningar verða taldar við.

# Roykipolitikkur settur í gildi í Tórshavnar Kommunu

**Nú verður ikki longur loyvt at roykja á kommunalum arbeiðsplássum í Havn**

ROYKIPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*Tórshavnar Kommuna tekur vandan við royking í álvara og setir nú forboð í gildi fyri at royka á arbeiðsplássum, sum kommunan varðar av, ella ber høvðuðskostnaðin av*

Tað verður vanligari og vanligari, at stovnar og fyritøkur seta roykipolitikk í gildi.

Og nú hevur eisini Tórshavnar Kommuna – kanska sum fyrsta kommuna í landinum – sett sín egna roykipolitikk í verk.

Tað er ein trýmanna nevnd undir býráðnum, sum hevur orðað roykipolitikkin. Og endamálið við at seta hann í verk, er at tryggja roykfrítt umhvørvi á øllum kommunalum arbeiðsplássum, soleiðis at øll starvsfólk kunnu útinna sítt arbeiði og øll viðskiftafólk kunnu avgreiða síni viðurskifti í einum roykfríum umhvørvi.

Í minsta lagi skulu arbeiðshøli, felagshøli, avgreiðsluhøli og tænastubilar nú verða roykfrí øki.

Sostatt verður royking einans loyvd í serligum hølum, sum eru ætlað at roykja í.

Har eingi serlig høli eru tøk, verður roykt uttandura, helst undir taki, tá ið hetta ber til.

Men allastaðni, har børn og ung verða ansað, verður bert roykt uttandura. Miðað verður eftir, at roykipolitikkurin eisini skal vera galdandi í fólkaskúlunum í kommununi.

Á stovnum, sum eru eru heim hjá búfólki, eigur rætturin hjá búfólkunum at ráða í egnum heimi, at verða virdur, tó soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri onnur búfólk á stovninum.

Á hesum stovnum eigur at verða skipað fyri uppihaldsstovu ella rúmi til roykjarar, men tey skulu sjálvi ráða fyri, um tey roykja inni hjá sær sjálvum.

Fólk, ið búgva styttri tíð á stovninum, hava ikki loyvi at roykja inni hjá sær sjálvum, men verða víst til roykirúmið.

Fyri at tryggjað, at roykipolitikkurin verður settur í verk, skulu tey ymsu arbeiðsplássini lýsa við roykiforboði við uppsløgum, skeltum ella á annan hátt og somuleiðis skulu arbeiðsplássini vísa á, hvar ið tað er loyvt at roykja.

Tey ymsu arbeiðsplássini skulu eisini upplýsa um vandan við royking, tað kann gerast við fundum, har uttanhysis ráðgevarar kunnu vera við og annars við skrivligum tilfari.

Harafturat skal skipast fyri avvenjingarskeiðum við uttanhýsis ráðgevara, har kommunan betalir helvtina av kostnaðinum fyri starvsfólk, ið vilja hava slík skeið. Men býráðið ger samstundis vart við, at tað bara vil betala fyri eitt skeið til hvørt starvsfólk.

Býráðið sigur eisini, at hetta er galdandi á øllum arbeiðsplássum, sum Tórshavnar kommuna varðar av ella ber høvuðskostnaðin av.



# Fjarlesararnir farnir um fyrsta skerið



*BP og Handilsskúlan: Tað er BP, sum fíggjar fjarlesturin sum part av førleikamenningini. Her verður sáttmálin undirskrivaður av Ragnari Magnussen, stjóri fyri Føroya Handilsskúla, og Hjarnar Djurhuus, stjóri fyri BP í Føroyum.*

**Um vikuskiftið varð skipað fyri móttøka í sambandi við, at flokkurin, ið lesur fjarlestur á Robert Gordon University umvegis Handilsskúlan, hevur lokið fyrsta partin av útbúgvingini**

FJARLESTUR
*Heri á Rógvi*

Um vikuskiftið varð skipað fyri móttøku og seinni døgurða fyri flokkinum av fjarlesarum á Føroya Handilsskúla.

Ein flokkur við átjan – upprunaliga tjúgu – fólkum hevur síðani í mars gingið sum fjarlesarar á Robert Gordon University í Aberdeen. Útbúgvingin er løgd til rættis sum partíðarundirvísing við fjarlestri. Talan er um eina master útbúgving í virkisleiðslu við heitinum Management Studies Course. Lesturin er normeraður til trý ár gevur rætt til master heitið. Næmingarnir eru fólk við útbúgving frá hægri lærastovni.

Robert Gordon er ein lærdur háskúli í Aberdeen, ið serliga er kendur fyri at vera eitt olju-universitet. Upprunaliga er skúlin ein handilsskúli burturav, men hann hevur eisini tikið náttúruvísindagreinir upp í, og tað er ikki serliga oljuvinna, sum er dominerandi.

Robert Gordon University fast nógv við skipaðan fjarlestur umvegis teirra Virtual Cambus.

Við stuðuli frá BP fóru Føroya Handilsskúli og Robert Gordon undir eitt samstarv fjarlestri.

Talan er um fyrst um eina roynd, men báðir partar tykjast sinnaðir fyri at víðka um samstarvið.

Hátíðarhaldið varð fyriskipað í sambandi við, at flokkurin nú hevur skilt um fyrsta skerið, go próvtøkuuppgávan , sum markerar endan á fyrsta árinum, er latin inn. Flokkurin er komin á tað, tey kalla,Post graduate certificate level.

Elsa Maria Olsen, sum hevur samskipað partin hjá Føroya Handilsskúla, sigur, at tað hevur gingið sera væl við flokkinum.

–Úrslitini hava verið sera góð, og tað hava ikki verið nakrir trupulleikar av nøkrum slag. Eisini á Rober Gordon eru tey bergtikið av føroysku næmingunum, sigur Elsa Maria Olsen.

Til hátíðarhaldið vóru flest allir næmingarnir við. Eisini vóru umboð fyri Handilsskúlan, umboð fyri Robert Gordon University, bretski konsulin í Føroyum og Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, í sambandi við, at Tórshavn og Aberdeen eru vinarbýir.

### Menna Handilsskúlan

Føroya Handilsskúli hevur stórar ætlanir um at fara undir bjóða hægri útbúgvingar enn miðnámsútbúgvingar.

Ein partur av hesum arbeiðinum er at seta á stovn eina menningardeild, har Elsa Maria Olsen er sett sum deildarleiðari.

–Tað eru nakrar formellar forðingar við ásentingunum um, at tað er Fróðskaparsetur Føroya, sum kann bjóða útbúgvingar av hesum slag. Vit vóna so at kunna samstarva við Fróðskaparsetrið, sigur Elsa Maria Olsen.

Føroya Handilsskúli og Robert Gordon University hava gjørt samstarvsavtalu, sum inniber, at átta av lærarunum á Handilsskúlanum skulu á skeið hjá Robert Gordon, har m.a. fýra vikur verða í Aberdeen, har lærararnir kunnu fylgja undirvísing á einum hægri stigi, enn tað, teir eru vanir við at undirvísa í.

–Undirbúgvingarnar hjá lærarunum er eingin trupulleiki, men teir skulu læra, hvussu teir skulu arbeiða við metodum, vegleiðingum og øðrum á einum hægri stigi, sigur Elsa Maria Olsen.



*Flokkurin við fjarlesarum á fyrsta skúladegnum í mars við skeiðleiðarum.*

